Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Nr. 59/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um landskassans part av útreiðslunum at umvæla grótkøst, sum eru farin í ódnarveðrinum, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin, at landskassin skal bera part av útreiðslunum at umvæla grótkøst, sum eru farin í ódnarveðrinum seinastu dagarnar?
2. Um so er, hvussu stóran part?

Viðmerkingar:
Í ódnarveðrinum, sum júst hevur verið, vórðu stórir skaðar kring landið. Í Hvalba og í Porkeri hava grótkøstini fingið stóran skaða. Møguliga er tað eisini støðan aðrastaðni í landinum, og í so fall fevnir spurningurin eisini um hesi støðini.

Havnarløgini eru í nógvar mátar partur av tilverugrundarlagnum um landið, men hetta er ein serlig støða, sum kommunurnar ikki hava havt møguleika at leggja upp fyri.

Tá ið slíkir skaðar hava verið áður, hevur landið verið við at fíggja umvælingina. Tí er spurningurin, um landsstýrismaðurin heldur, at landið í hesum føri eigur at hjálpa til, so at havnarløgini skjótast gjørligt kunnu vera gjørd aftur.

Á Løgtingi, 2. mars 2020

Sirið Stenberg